FØROYA KOMMUNUFELAG

FKF jour: 09-79_2
dags. 15-03-2010

Mentamálaráðið
Hoyvíksvegur 72
Postrúm 3279
110 Tórshavn

mmr mmr.fo

Viðv.: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um meirvirðisgjald

Felagið hevur 03-03-2010 móttikið uppskotið til hoyringar og er hettar viðgjørt á stýrisfundi 07-03-2010.

Innleiðing
Ítróttar- og mentanarverkløg eru umráðandi partur í frítíðarvirkseminum í kommununum. Hesi verkløg, vallir, hallir ella mentanarhús, savna hvønn dag mong, bæði ung og eldri, úrvalsfólk og amatørar, saman í ítróttar- og mentunarligum høpi.

Kommunur og lokal áhugafeløg hava gjøgnum mong ár staðið fyri bygging av hesum verkløgum. Hesi tøk hava ofta verið fíggjarliga tung at lyfta, tískil hevur stuðul frá landinum verið kærkomin.

Uppskotið stutt
Við hesum uppskotinum er ætlanin at fara frá núverandi stuðulsháttinum; at stuðla verkløgum, við beinleiðis stuðli, til afturbering av meirvirðisgjaldi. Søkjast kann um hettar.

Á hendan hátt verður støddin á stuðlinum frá landinum bundin av støddini av íløguni, skilt á tann hátt, at byggiharrin fær afturrindað tann prosentpartin av samlaða kostnaðinum, sum er MVG, líkamikið um íløgan er lítil ella stór.

Viðmerkingar til uppskotið
Sum meginregla er felagið ikki í móti, at farið verður frá beinleiðis stuðli, til afturberan av MVG.

Havast skal tó í huga, at skipa soleiðis fyri,:

- at smá verkløg á smærri støðum ikki detta niður ímillum í skipanini og,
- at øll tey stóru verkløgini ikki øll enda á meginøkinum.

1. mió.kr. markið
Í §3a verður ásett, at bert verkløg, har avgjaldsskyldigu útreiðslurnar er omanfyri 1. mió.kr., kunnu søkja um at fáa MVG afturgoldið.

Her metir felagið, at nógv minni verkløg, serliga á smærri støðum, koma at detta niður ímillum, tí fleiri av hesum ikki koma uppá milliónina. Lokalu græsrøturnar, sum í stóran

frammi í Gerði 1 • FO-340 Kvívík • Føroyar
Tel: (+298) 42 18 10 • Fax: (+298) 42 18 11 • kontakt@fkf.fo • www.fkf.fo

mun bera hettar økið í kommununum, fara at fáa trupult við at fáa fígging til størri verkætlanir, og vandi er fyri at hesar detta niður fyri.

Fyri at fáa smáu verkløgini við eisini, metir felagið, at 1. mió.kr. markið er sett alt ov høgt. Einki mark eigur at vera, ella eitt lágt sett bagatelmark.

Nevndin við serkønum
Setast skal ein nevnd við serkønum, at taka støðu til um á hvønn hátt umsóknirnar eru við til at tryggja eina hóskandi landafrøðiliga javnvág og taka atlit til heildarætlanum innan mentanar- og ítróttarverkløg, m.a. í sambandi við skipan av altjóða tiltøkum í framtíðini.

Eisini verður nevnt, at kommunufeløgini skulu verða knýtt at nevndini.

Felagið metir, at spurningurin um landafrøðiliga javnvág bert er relevantur, tá tosað verður um størri verkløg, har bert fá kunnu vera í landinum, t.d. 50 m. svimjihyl, golfvallir ella líknandi. Hetta kundi t.d. verði skipað í samband við eina heildarætlan viðv. altjóða tiltøkum.

Í mun til bygging av smáum lokalum verkløgum eigur hettar at verða upp til lokalu aktørarnar, feløg og kommunur, at skipa. Bert á hendan hátt kann ein lokal grundað menning av ítróttar – og metanarøkinum, har græsrøturnar á økinum eru við, fara fram.

Í samband við at kommunufeløgini skulu tilknýtast nevndini, hevði felagið vilja vita, meir konkret, hvat hettar inniber.

fyri felagið

Ásbjørn Djurhuus, formaður

Bergmann Finnsson, ráðgevi.

frammi í Gerði 1 • FO-340 Kvívík • Føroyar
Tel: (+298) 42 18 10 • Fax: (+298) 42 18 11 • kontakt@fkf.fo • www.fkf.fo